# FUNDARBÓK HJÁ VÁGS BÝRÁÐ 2015

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 1**<br>**Tíð:** 26. januar 2015 kl. 17.00<br>**Stað:** Kommunuskrivstovan | **Skrivari:** Petry Joensen | |
| **Fastir fundardagar:**<br>26. januar, 23. februar, 30. mars,<br>27. apríl, 01. juni, 29. juni<br>24. august, 28. september,<br>26. oktober, 30. november,<br>14. desember | **Møttir:**<br>Allir býráðslimir uttan Conrad | **Ikki á Fundi:**<br>Conrad Gaard Joensen, fráboðað |

Conrad G. Joensen hevur boða frá, at hann ikki kann møta á býráðsfundinum í kvøld og at næsti maður á listanum Olgar Mortensen møtur í hansara stað.

Einmælt samtykt.

**1) Mál nr.: 14/00257** Fíggjarætlan og leigu-avtalan fyri 2015 viðv. eldrabústaðir

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram dagførda fíggjarætlan 2015 fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy, uppskot er sent Vágs kommunu 5. januar 2015. Í mun til tølin Vágs kommuna fekk í november 2014 eri leiguinntøkurnar lægri og útreiðslunar hægri og kemur hetta at kosta Vágs kommunu 635.000,00 kr. meira enn mett í FÆ2015.

Eisini er stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna komi til eitt uppskot til leiguavtalu (prís fyri leigu) fyri 2015, fyribils galdandi fyri eitt ár, hetta greiðir borgarstjórin frá á fundinum.

**Avgerð:**
Samtykt við 8 atkvøðum fyri at taka undir við fyriliggjandi fíggjarætlanina. Málið viðv. møguligari eykajáttan verður tikið upp seinni í árinum.
Eitt ítøkiligt uppskot til skrivligan leigusáttmála verður lagt fyri býráðið á næsta fundi.

Olgar Mortensen atkvøddi ikki.

**2) Mál nr.: 15/00029** Roknskapur 2014 og Fíggjarætlan 2016 fyri Vágs Bókasavn

**Frágreiðing um mál:**
Borgarstjórin leggur fram Grannskoðan roknskap fyri 2014 og fíggjarætlan fyri 2016 fyri Vágs Bókasavn.

Undirskriva:

Roknskapurin 2014 vísir útreiðslur uppá 348.502,00 kr. Fíggjað við kommunustudningi uppá 204.798,00 kr., Landsstudningi uppá 106.276,00 kr. og innkrevningargjødum uppá 155,00 kr.. Statusuppgerðin javnvigar við 3.065.240,00 kr. 31/12-2014.

Fíggjarætlanin fyri 2016 vísir ein rakstur uppá 600.000,00 kr., fíggjað við kommunustudningi uppá 493.000,00 kr., Landskassastudningi uppá 106.000,00 kr. og innkrevijingargjøldum uppá 1.000,00 kr..

**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Undirskriva: